ítróttur

Nr. 184 • mikudagur • 28. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Allan Simonsen gevst sum venjari

**Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti hevur tikið seg aftur frá venjarayrkinum. Síðani hann fór úr landsliðsvenjarastarvinum í Luksemborg í fjør, hevur hann hugsað um støðuna og tikið sína avgerð**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Mær hevur dámt væl arbeiðini, sum eg havi havt. Bæði í Føroyum og í Luksemborg var tíð til at byggja nakað upp, og tað vóru spennandi avbjóðingar. Men nú tá ið eg havi verið venjari síðani 1991, haldi eg, at eg havi latið mítt, sigur Allan Simonsen*

52 ára gamli Allan Simonsen er givin sum fótbóltsvenjari. Tað hevur hann gjørt av, eftir at hava hugsað seg væl um, síðani hann fór úr starvinum sum landsliðsvenjari í Luksemborg í fjør.

– Eg havi gjørt av at halda einsteðg, og so fáa vit at síggja. Sjálvandi kann eg ikki avskriva allar møguleikar í tíð og ævir, sigur Allan Simonsen við danska Tipsblaðið um vikuskiftið.

Hann staðfestir tó, at tað skal eitt heilt serligt tilboð fyri at fáa hann aftur í eitt venjarastarv.

– Nú ælti eg mær at hugna mær við familjuni og annars hugsa um klædnafyritøkuna Time Out í Herning, sigur hann.

Felagið, sum Allan Simonsen eigur í, er veitari til ítróttarmerki sum Puma og Reebok.

### Nú er liðugt

Allan Simonsen telist millum teir størstu spælararnar í donskum fótbólti nakrantíð. Hann spældi fyri feløg sum Vejle, Mønchengladbach, FC Barcelona og Charlton, og í 1977 varð hann valdur til besta spælara í Europa.

Fyrsta venjarastarvið hevði Allan Simonsen heima í Vejle frá 1991 til 1993, tá ið hann gjørdist landsliðsvenjari í Føroyum. Hann varð verandi í Føroyum fram til 2001. Síðani var hann landsliðsvenjari í Luksemborg, men hann var loystur úr sáttmálan eitt ár fyri tíð – tað var í desember mánaði í fjør.

– Mær hevur dámt væl arbeiðini, sum eg havi havt. Bæði í Føroyum og í Luksemborg var tíð til at byggja nakað upp, og tað vóru spennandi avbjóðingar. Men nú tá ið eg havi verið venjari síðani 1991, haldi eg, at eg havi latið mítt, sigur Allan Simonsen við Tipsblaðið.

Hann er nú fluttur til spanska býin Stiges at búgva. Býurin liggur 150 metrar frá Miðalhavinum og einar 25 kilometrar frá gamla heimavøllinum hjá Allani Simonsen í Barcelona.

# Skálagentur vunnu greipuna

**Nú besta mansliðið hjá Skála stríðist fyri FM-heitinum, var tað kanska eitt hugskot, um teir spurdu gentuliðið hjá felagnum um ráð**

MEISTARAR



*Í aftara raði frá vinstru standa: Andrass Danielsen, venjari, Birita Poulsen, Mirjam Debora Frederiksberg, Martha Frederiksberg, Mirjam Johansen , Herta Kass.*
*Í fremra raði frá vinstru eru tað: Kirstinbjørg Frederiksberg, Bára Berthelsen, Fríðrún Danielsen og Oddrún Danielsen*

Tað eru ikki bara menninir hjá Skála, sum duga at sparka.

Tað duga genturnar eisini og nú er greitt, at tað smágenturnar hjá Skála hava vunnið greipuna í ár. Fyrr í summar vunnu tær Niels L. Arge steypið við einum 3 - 1 sigri á VB í finaluni í Gundadali. Leygardagin vunnu tær so meistarabólkin fyri smágentur og harvið eisini FM-heitið.

Í seinasta umfarinum leygardagin, vunnu tær 2-1 á Royn og 2-0 á VB.

Annars eru tær ósigraðar í kappingini í ár-í hvussu so er á vøllinum. Einasti dystur, tær ikki vunnu, var ein málleysur javnleikur. Á pappírinum hava tær tapt ein dyst, men tað var nettupp á pappírinum, tí tað var ein dystur, sum ikki varð spældur.

Kjarnin á hesum smágentuliðnum hjá Skála, hevur spælt saman í fimm ár, so tær kenna hvønn annan væl, og og tað ger eisini sítt til, at samanspælið virkar so væl. Og tær hava sanniliga eisini staðið seg væl, tí tær vunnu FM bæði í 2001, 2002, 2003 og so aftur í ár. Í 2004 lógu tær eisini væl fyri, men fingu silvur, tá ið tær á stokkinum mistu FM heitið til AB.

Til stuttleika kann leggjast afturat, at allar genturnar á hesum Skála-liðnum eru av Strondum.

Annars vann AB silvur í FM kappingini í ár og Royn vann bronsu.

# Unglingarnir avgera í kvøld

**NSÍ og HB fara í dag klokkan 17 at spæla finalu á Skála**

UNGLINGAR

Tvey av feløgunum, sum seinastu nógvu árini hava vunnið nógv mest í unglingadeildini, fara í dag at stríðast um, hvør eigur besta unglingaliðið í 2005.

NSÍ og HB eru komin í finaluna, sum verður spæld á uttanveltaðum vølli. FSF hevur gjørt av, at dysturin skal spælast á Skála. Tað verður hann klokkan fimm í dag, og tað verður Petur Reinert, sum skal halda skil á.

Í fjør vann EB/Streymur FM í unglingadeildini. Teir vunnu 2-1 á HB í finaluni. NSÍ vann bronsudystin 5-1 á B36.

HB vann sína hálvfinalu 2-1 á B36, og NSÍ vann sína hálvfinalu 7-6 á KÍ, eftir at tað eftir vanliga leiktíð og longda leiktíð hevði staðið 1-1, og tað síðani var neyðugt at finna vinnaran í brotssparkskapping.

**jh**

# Hickersberg er aftur á landsliðið

Landsliðsvenjarin, sum misti starvið eftir tapið ímóti Føroyum í Landskrona, verður nú aftur landsliðsvenjari fyri Eysturríki – júst 15 ár eftir at hann fekk fótin

Tað eru tey vánaligu úrslitini í undankappingini til HM í Týsklandi næsta ár, sum hevur fingið eysturríkska fótbóltssambandið at siga landsliðsvenjara Hans Krankl úr starvinum.

Samstundis er tað gjørt av, at Josef Hickersberger tekur við starvinum. Hann var eisini landsliðsvenjari frá 1988 og fram til lagnudagin í Landskrona í 1990, tá ið Føroyar vunnu á Eysturríki. Tað kostaði Hickersberger starvið.

Men hann hevur seinnu árini veruliga fingið gongd á sína yrkisleið aftur og hevur verið venjari fyri Rapid Wien, nú hann verður útnevndur til landsliðsvenjara aftur.

**-ek**

# Liverpool-fjepparar á ferð

**Liverpool Føroyar skipar fyri spennandi túri til Liverpool í døgunum 29 oktobur til 1. novembur**

FÓTBÓLTSFERÐ

*tíðindaskriv*

Liverpool fjepparar hava nú møgleikan at verða til staðar at síggja Liverpool FC spæla tveir dystir á rað á Anfield, ein í Premier League móti West Ham, og ein í Champions League móti Anderlecht.

Flogi verður úr Vágum leygarmorgunin 29 oktobur kl 08.00 beinleiðis til John Lennon Airport í Liverpool og aftur týskvøldi 1 novembur um midnáttina til Vágar.

Gist verður á 4 stjørnaðum hotelli beint uttanfyri Liverpool. Møguleiki verður m.a. at vitja Anfield Museum og The Beatles Museum. Kostnaðurin fyri ferðina er kr 5.995. Meira fæst annars at vita á slóðini, www.liverpool.fo

# Dómaraskeið fyri flogbóltin

Flogbóltssambandið hevur sent skriv til feløgini kring landið, har boðað verður frá, at dómaraskeið verður hildið í Havn vikuskiftið, 7. og 8. oktober.

Tað verða teir báðir, Hans Ole Nielsen og Torben Jensen, sum skulu undirvísa luttakarunum, og einki er at ivast í, at hetta eru kompetentir frálærarar.

Dómaraspurningurin hevur ofta verið ein trupulleiki hjá flogbóltinum seinnu árini, og tí hevur FBF hesa ferð sett sum treyt, at feløg, sum hava umboðan í meistaradeildini í minsta lagi skulu senda tvær dómarar á skeiðið.

**-mørk**